# Fiskamatur á Argja skúla



*Fyrru ferð Birgir Enni vitjaði húsarhaldsbreytina, varð borðreitt við øðu*

**Húsarhaldsbreytin á Argja skúla hevði mánadagin vitjan av Birgir Enni, kokki, sum vísti teimum ymiskar hættir at hagreiða fisk, og so gjørdu tey ein døgurðabita eisini**

SKÚLI
*Solby A. Eliasen*

Mánadagin hevði húsarhaldsbreytin í Argja skúla vitjan av Birgiri Enni og Dánjali Norðberg, sum vístu næmingunum, hvussu flak verður skorið og hvussu arbeitt verður, tá ein skal turka grind ella fisk. Eisini gjørdu tey ein døgurðabita.

Birgir Enni letur væl at. Hann sigur, at hann hevur verið á Argja skúla einaferð áður, men tá var hann einsamallur. Men hesuferð hevði hann so Dánjal Norðberg við sær, sum greiddi næmingunum frá um turkaða grind og turran fisk.

Birgir sigur, at Dánjali dámdi avbera væl at greiða næmingunum frá, og hann lat væl at teimum, tí tey lurtaðu so væl eftir.

– Tað eydnaðist sera væl, haldi eg. Næmingarnir eru ótrúliga fittir og áhugaðir í at læra. Tey spurdu nógv og lurtaðu væl eftir, sigur hann.

Við sær høvdu Birgir og Dánjal tvær baljur av hvítingi, sum teir lærdu næmingarnar at skera flak av. Tey fóru øll hugagóð í gongd, og tá liðugt var fingu tey hvør sín posa av flaki, sum tey sjálvi høvdu skorið, heim við. Tað vóru tey sera glað fyri og eisini errin. Við sær hevði Birgir eisini laks, og døgurðin henda dagin stóð upp á laksakotilettir við grønmeti og sós. Næmingarnir stákaðust sjálvir, og Birgir legði teimum lag á.

Hetta er aðru ferð, at Birgir Enni vitjar Húsarhaldsbreytina á Argja skúla. Fyrru ferð var hann var og vísti teimum, hvussu ein matgerð við skeljadjórum. Tá borðreiddi kokkurin við øðu fyri næmingunum, sum sjálvandi tá eisini fingu høvi at royna seg.

Húsarhaldsbreytin er ein partur av tíggjunda skúlaárinum. Endamálið er, at næmingar skulu fara út úr skúlanum við einum hollum kunnleika til húsarhald og matgerð av ymsum slagi.



*Dánjal og Birgir høvdu tvær baljur av hvítingi við, so næmingarnir sluppu at royna seg at skera fløk. Og so fingu tey hvør sín posa av flaki heim við*



*Mánadagin stóð matskráin á Argja skúla upp á laksakotilettir við grønmeti og sós. – Næmingarnir lótu sera væl at og vóru óførir, sigur Birgir Enni*



# Yvirtøkur í fasta legu



*Lýggjari vindar blæsa millum forsætisráðharran og løgmann. Teir tykjast samdir um at savna allar yvirtøkur í eina lóg*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Nýggir vindar blæsa í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Burtur er konfrontatiónin, og nú leggur løgmaður upp til, at øll mál skulu kunna yvirtakast. Forsætisráðharrin styðjar royndina at fáa allar yvirtøkur í eina lóg**

POLITIKKUR
*Ingi Rasmussen*

»Hetta er ein roynd at fáa sjálvstýrismálið í eina fasta legu.«

Anfinn Kallsberg, løgmaður hevur eina ætlan, sum tykist ógvuliga einføld. Í staðin fyri at fara í Fólkatingið, hvørja ferð eitt mál skal flytast úr Danmark til Føroya, ætlar hann sær eina ferð med alla at fáa eitt standandi loyvi til at fremja yvirtøkur.

Við øðrum orðum verða øll tey málsøki, sum liggja millum Føroya og Danmarkar, gjørd til A-mál, ella føroysk sermál, sambært heimastýrislógini.

Tað merkir, at føroyingar kunnu einsíðugt yvirtaka eitt málsøki, tá tað er búgvið. Afturfyri átakur heimastýrið sær eisini at gjalda fyri tað, sum heimastýrislógin ásetir.

– Hetta er ein máti at gera tingini praktisk. Tað verður ikki longur ein spurningur um konfrontatiónir millum Føroyar og Danmark, men aleina ein spurningur um, nær føroyingar hava fyrireikað seg nóg væl til, at eitt málsøki kann yvirtakast. Tá vit eru klár at yvirtaka eitt mál, so verður tað gjørt, um løgtingið samtykkir tað, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður.

Talan er framvegis um eitt uppskot, sum skal góðtakast av donsku stjórnini, men forsætisráðharrin hevur longu givið til kennar, at tað ljóðar skilagott.

– Forsætisráðharrin hevur sagt løgmanni, at hann heldur tað vera skilagott, at vit arbeiða við einari yvirtøkulóg í staðin fyri einari rúgvu av lógum, sigur Anfinn Kallsberg.

Sostatt er líkt til, at nýggir og lýggjari vindar blæsa millum Føroyar og Danmark. Alt byrjaði við føroyavitjanini hjá Anders Fogh Rasmussen, sum endaði við einari semju um, at føroyingar kunnu yvirtaka øll málsøki, um vit bara gjalda fyri tey.

Undantikin eru sjálvandi tey mál, ið knýta seg at grundlógini, tað vil siga uttanríkismál, gjaldoyra, verja og heimarættur. Tey vera ikki yvirtikin, fyrr enn Føroyar taka fullveldi við einari fólkaatkvøðu, sigur løgmaður.

Sostatt snýr politikkurin seg um at tráðnýta møguleikarnar í Heimastýrislógini. Hetta minnir ikki sørt um uppskotið hjá Sambandsflokkinum um nýskipan.

– Kanska, eg veit ikki. Eg havi ongantíð rættiliga fatað, hvat Sambandsflokkurin vil. Teir siga, at vit skulu kunna yvirtaka alt, men teir vilja onki yvirtaka. Hetta er so ein roynd at gera tingini meira praktisk, og tað áttu øll at tikið undir við, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður.

# Fogh fagnar yvirtøkuleisti

**Anders Fogh Rasmussen er »fuldt ud indstillet« at ganga ynskjum landsstýrisins á møti við at gera eina yvirtøkulóg undir einum, sum savnar øll málsøkini uttan fyri heimastýrislógina**

YVIRTØKUR
*Ingi Rasmussen*

Alt byrjaði á einum morgunfundi Bø. Tá hittust løgmaður og forsætisráðharrin, tí ríkisfundur var í Føroyum. Aftur við einum morgunmati samdust Anfinn Kallsberg og Anders Fogh Rasmussen um, at lógargrundarlagið fyri yvirtøkum í framtíðini átti at savnast í eini og somu lóg, og at føroyingar skuldu fyrireika eitt uppskot.

Soleiðis slapst undan, at eitt mál skuldu í Fólkatingið av venda, hvørja ferð eitt mál, sum ikki stóð í heimastýrislógini, skuldi yvirtakast.

Sosialurin hevur fingið innlit í málið, og í einum notati, sum er skrivað 27. september 2002 og sent donsku stjórnini sæst, hvussu løgmaður hevur hugsað sær yvirtøkur í framtíðini.

Grundprinsippið er, at heimastýrisskipanin verður víðkað til at fevna um øll viðkomandi málsøki við undantaki av uttanríkismálum, verju av Føroyum og heimarættin. Hesi verða framvegis at síggja sum felags mál, ið Danmark umsitur.

Í brævinum verða orð sett á, hvørji málsøki kunnu yvirtakast við eini og somu lóg, sum verður løgd fyri Fólkatingið. Tey eru m.a. útlendingaøkið, dómstólarnir, revsilógarøkið, persóns-, familju- og arvarættarliga økið.

Við lógini verður sostatt gjørt av, at øll øki kunnu yvirtakast, tá tað er neyuðgt. Tey mál, sum eru á B-listanum í heimastýrislógini og enn ikki eru yvirtikin, tað vil siga løgreglan og fólkakirkjan, halda kortini fram sum higartil. Tær yvirtøkurnar verða fyrireikaðar í løtuni. Løgreglan liggur nakað frammi í tíðini, meðan fólkakirkjan er undir landi.

Sjálv yvirtøkulógin er í fimm greinum. Hon kallast »lov om overtagelse av sagsområder fra danske myndigheder til færøske myndigheder«.

Anders Fogh Rasmussen svarar løgmanni 16. oktober 2002, og hann tekur væl ímóti notatinum.

»Som jeg nævnte på mødet, er jeg fuldt ud indstillet på at igangsætte et arbejde med at undersøge om og hvorledes, det vil være muligt at imødekomme landsstyrets ønsker med hensyn til en sådan lovgivning, med udgangspunkt i landsstyrets redegørelse herfor,« skrivar forsætisráðharrin til løgmann.

Tað merkir helst, at tað ikki verður so torført at yvirtaka málsøki í framtíðini, sum tað kanska hevur verið. Alt verður savnað í eini og somu lóg, og um bara føroyingar vilja gjalda, so sleppa teir eisini at valda.

# Løgregluyvirtøka gongur eftir ætlan

**Arbeiðið at fyreika yvirtøkuna av løgreglu og rættarskipan verður liðugt áðrenn summarferiuna, og tá verður upp til politisku myndugleikarnar í Føroyum og Danmark at gera av, hvussu farið verður víðari, sigur Rúni Joensen, aðalstjóri í løgmálaráðnum.**

YVIRTØKUR
*Ingi Rasmussen*

Arbeiðið at fyrireika yvirtøkuna av løgregluna og rættarskipanina gongur væl.

Tað sigur Rúni Joensen, aðalstjóri í løgmálaráðnum.

Uppundir vikuskiftið var embætisfundur millum føroyska og danska løgmálaráðið, og tá varð avtalað, at næsti fundurin verður 19. februar.

Tá verður skapið gjørt til eina endaliga frágreiðing, sum verður latin landsstýrinum og donsku stjórnini til støðutakan. Eftir hetta kunnu vit vænta politiskar samráðingar, sum gera av, hvussu víðari verður farið fram.

Embætismannanevndirnar arbeiða eftir eini arbeiðsætlan, sum Høgni Hoydal landsstýrismaður og Frank Jensen, fyrrverandi løgmálaráðharri, avtalaðu. Sagt var í avtaluni, at »der skal udarbejdes et oplæg til efterfølgende politisk beslutning om Færøernes overtagelse af politi og retsvæsen samt hertil knyttede sagsområder.«

Øll skipanin, sum hon er í dag, verður lýst út í æsir. Føroysku embætisfólkini skulu eisini lýsa, hvørjar umsitingarligar og løgligar broytingar skulu fremjast, tá málsøkini koma á føroyskar hendur, og á hvørjum økjum neyðugt verður at samstarva við Danmark eftir eina yvirtøku.

– Tað, sum vit nú fáast við, er rættiliga prinsipielt. Tað er nú, at karmarnir verða lagdir fyri eina yvirtøku. Tá landsstýrið og stjórnin eru komin ásamt um, hvussu farast skal víðari, koma embætisfólkini aftur upp í leikin. Tá fara tey meiri ítøkiliga til verka og gera nýggja lóggávu fyri eina føroyska løgreglu og rættarskipan, sigur Rúni Joensen.

Í samgonguskjalinum er ikki ásett, at løgregla og rættarskipan skal yvirtakast í hesum valskeiðnum, men sagt verður bara, at arbeiðast skal víðari við fyrireikingunum. Hinvegin kunnu vit vænta, at eitt nú familju- og persónsrættur verða yvirtikin áðrenn langt umlíður.